TB-KÍ 0-0:

# Lásið fór ongantíð upp á Sevmýri

**Uppløgdu málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, og efir steðgin var ferðin ikki so stór, tá ið TB og KÍ sættaðust við málleysan javnleik**



*Tað tóktist, sum um málleysi javnleikurin var til at liva við hjá báðum pørtum á Sevmýri*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**TB-KÍ**
*Jóannes Hansen*

Eitt stig var at liva við. Tann hugburðurin tóktist at gerast alt meiri ráðandi, sum seinna umfarið leið í nógva vindinum á Sevmýri.

Í síðstu løtu var kortini um reppið, at KÍ fór við øllum. Ovi Nysted hevði fína frísparksroynd úti frá, sum frágera góði TB málverjin, Predrag Markovic, bjargaði stak væl, og Høgni Madsen smekkaði til úti frá og undan vindinum, men bólturin fór dygst skeivu megin stólpan.

Tvørámenn eru brandar til verjuspælið. Teir duga sera væl at skipa seg, og hóast mótstøðumenninir hava bóltin nógv, so tykist tað sum um, at tað er TB, sum ofta ger av, hvussu spælið skal ganga fyri seg.

Nýggi KÍ venjarin hevði broytt uppstilling. Í staðin fyri 4-4-2, sum liðið higartil hevur spælt, so vóru klaksvikingar í 4-3-3 uppstilling. Ovi Nysted var fluttur úr miðverjuni og í fremstu ódn. Í borðunum báðum vóru Arnhold Joensen og Heðin á Lakjuni, og so tóktist ætlanin at vera, at teir skuldu frá baklinjuni senda innlegg í høvdið á Ova og kanska í føturnar á Hjalgrím Elttør, sum aftur var á liðnum og hesa ferð var fremsti miðvallarin.

KÍ megnaði so at siga ikki at bróta ígjøgnum í borðunum. Teir royndu at finna hvønn annan úti á vøllinum, men tað endaði ofta við at høgar sendingar vórðu lagdar ímóti Ova Nysted, men hann hevði torførar treytir, tá ið tað vóru Óli Johannesen og Aca Petrovic, sum ansaðu honum og vendu rætta vegin.

Bara fyrra partin av fyrra umfarinum sást venjaraeffektin, sum tað plagar at verða nevnt, tá ið venjarin er útskiftur, og liðið fær nýggja innspræning. Tá vóru klaksvíkingar ágangandi, og TB var trýst.

Men so fótaði TB sær, og síðani gekk nógv tað mesta fyri seg eftir teirra treytum.

Tvørámenn høvdu tveir møguleikar, sum væl kundu havt borið mál við sær. Í fyrra førinum smekkaði Óli Johannesen fríspark undan vindinum. Bólturin brast í tværtræið, áðrenn hann stakk út aftur í spælið.

Í seinna førinum varð Olivur Abrahamsen, sum hesa ferð var annar av álopsspælarunum, spældur leysur innanfyri KÍ verjuna. Hann setti ferð á og royndi at lyfta upp um KÍ málverjan, sum var komin nakað út úr málinum, men Karstin Joensen fekk akkurát ytsta lið á fingrunum á bóltin og vardi soleiðis fyri.

### Tunnir frameftir

TB hevði vindin ímóti eftir steðgin. Tá sýndu teir betri spæl, enn teir høvdu gjørt undan vindinum. Men trupulleikin hjá tvørámonnum er, at teir hava ikki ta álopstyngdina, sum skal til fyri at skapa møguleikar og harvið at fáa mál.

Tað er ógvuliga stórur saknur, at Daniel Nyarko framvegis er knæskaddur. Hann var ætlaður at eiga berandi leiklut á sentrala miðvøllinum. Tað var Alexander Jovevic eisini ætlaður at gera. Hann hevur leingi verið skaddur, men sunnudagin spældi hann seinna partin av seinna umfarinum, og nú verður vónað, at hann fer at vera tøkur næstu dagarnar, tá ið stóru uppgávurnar fara at vera á skránni.

Málið, sum skuldi til fyri at lætta um føstu bindingarnar, kom ongantíð á Sevmýri, og sum 2. hálvleikur leið í lækkaði ferðin, og tað tóktist sum um, at báðir partar vóru nøgdir við at fáa í hvussu so er eitt stig í úrtøku.

## FAKTA UM DYSTIN

**TB-KÍ 0-0**
**Dómari:** Páll Augustinussen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Mortan Enni (Alexander Jovevic, 65.), Einar Petersen (Hallur Christiansen, 89.), Búi Mortensen (Allan Poulsen, 82.), Birgir Rasmussen - Emmanuel Larbi, Olivur Abrahamsen
**Gult kort:** Mortan Enni, Predrag Zivkovic
**KÍ:** Karstin Joensen - Leon Bjartalíð, Jan Andreasen, Niclas Niclassen, Eyðun Klakstein - Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør, Høgni Madsen - Arnhold Joensen (Kristoffur Jacobsen, 73.), Ovi Nysted, Heðin á Lakjuni (Julian Samuelsen, 82.)
**Gult kort:** Niclas Niclassen, Høgni Madsen

# Veteranurin sær ljóst upp á tað

**Jón Johannesen sær allar dystirnar sum íløgu í framtíðina soleiðis at skilja, at ungu menninir fáa royndirnar, sum skulu til fyri at styrkja um sjálvsálitið**

**TB**
*Jóannes Hansen*

Hóast teir ikki fingu meiri enn eitt stig burturúr á heimavølli, so vóru teir í TB ikki misnøgdir við úrtøkuna ímóti KÍ.

- Um væl hevði viljað við, so høvdu vit kanska vunnið við einum máli. Men um illa hevði viljað við, so høvdu vit kanska tapt við einum máli. Ofta hevur TB tapt sovornar dystir, men tíbetur hava vit nú framúr góðan málverja, sum var gull verdur fyri okkum, tá ið teir endiliga fingu møguleikan.

Tað er TB veteranurin, Jón Johannesen, sum vit práta við. Hann fjalir ikki yvir, hvat tað snýr seg um hjá TB.

– Vit eru uppflytarar, og vit kenna treytirnar. Hjá okkum ræður tað um at varðveita plássið í deildini, og vit verða væl nøgdir, um endastøðan verður, sum støðutalvan nú vísir. Vit hava fleiri ungan spælarar á liðnum. Teir mugu fáa royndirnar fyri at fáa sjálvsálitið, sum skal til fyri at verða førur fyri at vísa tað í dystum, sum teir eru førir fyri undir venjing.

*Nú standa lykladystir fyri framman?*

– Avgjørt. Um vit høvdu megnað at fingið stig í Vági mikukvøldið og so vunnið á heimavølli móti TB, so hevði støðan verið góð. Men um vit skulu vinna, so mugu vit fáa tyngd í álopspartin. Tað er stóra takið, tí samstundis vilja vit ikki sleppa í verjuni, sum er útgangsstøðið hjá okkum, staðfestir Jón Jóhannesen.

# Gamal dreymur vorðin veruleiki

**Oddbjørn Joensen ásannar, at fyrstu vikuna verður tað mest við orðum, at hann hevur møguleika at ávirka spælararnar í gamla felagnum hjá venjaranum**

**KÍ VENJARIN**
*Jóannes Hansen*

Fram til og við 1987 var hann evnaríkur miðvallarspælari í Klaksvík, har hann er føddur og uppvaksin. Síðani hevur hann búð í høvuðsstaðnum. Hann hevur fyri tað mesta spælt og verið hjálparvenjari í HB. Fyrst í níti árunum vandi hann LÍF í 1. deild,og í 1997 hevði hann í tveir mánaðir ábyrgdina av besta HB liðnum.

Nú er hann vorðin venjari í Klaksvík. Hann sigur seg harmast um mátan, sum hann hevur fingið ábyrgdina uppá.

- Tað er ongantíð hugaligt at gerast venjari á henda hátt. Men eg fekk hetta bjóða, og eg tók av. Satt at siga so er tað gamalur dreymur at sleppa at venja KÍ, og eg veit ikki, nær møguleikin hevði komið aftur, ella um hann yvirhøvur hevði komið aftur.

*Hvussu ætlar tú at ávirka liðið?*

- Í fyrstu atløgu verður tað mest við orðum. Skráin er hørð. Vit spældu sunnudagin á Tvøroyri, mikudagin skulu vit spæla á heimavølli móti EB/Streymi, og mánadagin skulu vit spæla í Fuglafirði. Eg havi broytt skipanina frá 4-4-2 og til 4-3-3. Tað eru ikki stundir til nógvar venjingar. Eg havi sagt við spælararnar, at eg vil hava, at teir sleppa nervunum, og at teir royna at halda upp á bóltin. Eg haldi, at KÍ er nóg gott lið til at vera bólthaldandi.

*Hvat eru framtíðar ætlanirnar?*

Tað er týdningarmikið at spæligleðin er til staðar. Á Tvøroyri vístu allir rætta hugburðin, og tað er gott at byggja á. Men tað skal stríðast nógv, og eg vóni, at vit fara at koma væl undan hesi næstu vikuni.

### Meiri fólk

Oddbjørn Joensen heldur, at tað eru ov fáir spælarar í KÍ hópinum. Hann sigur, at hetta skal ikki skiljast soleiðis, at hann ikki er nøgdur við teir, sum eru tøkir, men hann vildi havt einar tríggar afturat.

- Eg vil hava størri kapping um plássini. Tað havi eg sagt við leiðsluna, og vit arbeiða við onkrum møguleikum at fáa spælarar. Men tað er torført hesa tíðina av árinum.

*Hvat fyri spælarar vilt tú hava?*

- Sum sagt so eri eg nøgdur við teir, sum vit hava. Men eg hevði einki havt ímóti at fingið ein aftfurat í hvørjari ketuni, sigur nýggi KÍ venjarin, sum er sera spentur upp á uppgávuna.